UTTAN ÚR HEIMI

## Vísmenn fýlast á avtalu

Teir óheftu donsku vísmenninir hava ilt við at góðtaka avtaluna, sum danska stjórnin og A.P. Møller gjørdu í heyst um oljuna í Norðsjónum.

Stjórnin sigur, at avtalan er sera góð fyri ríkiskassan, men hesum eru vísmenninir ikki heilt samdir við henni í. Ein teirra, Jørgen Birk Mortensen, sigur, at hóast nógvir spurningar hava verið frammi um avtaluna, og hóast teir flestu eru svaraðir, so vantar framvegis eitt yvirlit yvir tær búskaparligu avleiðingarnar. Fyrr enn tað kemur, ber ikki til at siga, hvussu góð avtalan er, sigur hann. Ein annar av vísmonnunum, Torben H. Andersen, sigur, at tað er sera umráðandi, at samfelagið fær at vita, hvørjar avleiðingarnar av avtaluni verða. Hann vísir á, at avtalan er galdandi líka til 2042, og tí er neyðugt við einari neyvari frágreiðing um avleiðingarnar, sigur hann.

Serliga sosialdemokratarnir hava lagt trýst á stjórnina fyri at fáa eina neyvari útgreining av Norðsjóvaravtaluni, men hesum hava stjórnin og danski fólkaflokkurin víst aftur.

## Selja útgerð av landinum

Í fjør fóru næstan 30 norsk fiskavirkir á húsagang, og ein stórur partur av maskinunum eru síðani seldar av landinum fyri lítið og einki.

Tað kom fram á einari fiskivinnuráðstevnu í Tromsø nú um dagarnar. Sum dømi bleiv nevnt, at tá fyritøkan Melbu Fiskeindustri fór á heysin, hevði virkið maskinur fyri 7,5 milliónir krónur. Men tær vórðu tiknar niður og seldar til Kina fyri 450.000 krónur. Har eru maskinurnar settar uppaftur.

Á ráðstevnuni í Tromsø vóru røddir frammi, sum hildu, at norðmenn eiga at gevast at virka fisk. Ístaðin eiga teir at miðsavna orkuna um at fiska og selja fisk. Hesi vístu á, hvussu mong virkir eru farin á húsagang, og tey søgdu seg ikki ivast í, at uppaftur fleiri fara sama veg. Víst varð á, at talið á vanligum flakavirkjum er minkað nógv, og at tey, sum eftir eru, fara ikki at fáa raksturin at bera seg kortini. Onnur hildu, at fiskiídnaðurin í Noregi hevur eina framtíð, og at ávísar feskar vørur tykjast hava góð útlit á marknaðinum.

## Stóra skattarokning

Russiska skattavaldið er nú liðugt at kanna tey skattligu viðurskiftini hjá risastóra oljufelagnum Yukos.

Úrslitið er, at felagið hevur fingið eina skattarokning upp á heilar 30 milliardir krónur, sum er eykaskattur fyri seks tey seinastu árini. Tað stóra talið umfatar eisini rentur og bøtur, sum felagið fær, tí tað hevur goldið skattin ov seint. Sambært skattavaldinum hevur Yukos ikki goldið allan skattin seinastu seks árini, men hevur tilvitað hildið nógvum pengum aftur.

Russiska ákæruvaldið hevur seinastu tíðina kanna ymisk viðurskifti hjá oljufelagnum, sum millum annað er lagt undir svik. Stjórin í Yukos, Mikhail Khodorkovski, situr varðhaldsfongslaður, og hann er skuldsettur fyri svik.

## Olja í ánni

Umhvørvismyndugleikarnir í Østfold í Noregi bera ótta fyri fugla- og dýralívinum við og í ánni Hobøelva, eftir at fleiri túsund litrar av olju eru endaðir í ánni.

Sunnudagin varnaðist ein maður, at olja var at síggja í ánni, og seinni komu myndugleikarnir eftir, at oljan stavaði frá einum tanga á einum bóndagarði. 10.000 litrar av olju høvdu verið í tanganum, men tá løgreglan kannaði hann, vóru bara 2.300 litrar eftir í honum.

Nú bera umhvørvismyndugleikarnir ótta fyri dýralívinum har á leiðini. Teir siga, at tað er serliga óheppið, um fuglur kemur í samband við oljuna, tí tað er óheppið hesa tíðina á árinum, tá fjaðrarnar eru avgerandi fyri, at fuglur kann liva veturin av. Samstundis hava myndugleikarnir gjørt av at kanna oljutangar á øllum bóndagørðum.

# Stjórnarkreppa hóttir Blair



*Tað er minni enn so vist, at kaffimuðurin fer at gagnast bretska forsetanum so væl tann næsta mánaðin*

*Mynd: Reuters*

**Eitt uppskot um at krevja eitt gjald frá teimum lesandi á lærdu háskúlunum í Bretlandi kann kosta Tony Blair, forsætisráðharra dýrt**

BRETLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógv hava ávarað Tony Blair ímóti at fremja uppskotið í verki, tí tað kann fara at kosta bæði flokkinum og honum sjálvum dýrt.

Men forsætisráðharrin hevur nú gjørt greitt, at hann ætlar sær ikki at taka tað aftur. Tí er lagt upp til opið stríð ímillum forsætisráðharran og teir limirnar í Labour, sum eru ímóti tí, og teir konservativu fara at gera alt fyri at fáa sum mest burtur úr ósemjuni, siga eygleiðarar í London.

Á einum tíðindafundi fyrradagin varð Tony Blair spurdur, um hann fer at leggja frá sær, um uppskotið fellur. Hann vildi ikki svara spurninginum, men segði, at hann leggur stóran dent á at fáa málið framt.

Upprunaliga skuldi Parlamentið taka støðu til uppskotið, áðrenn tað fór í jólafrí, og Blair viðgekk á tíðindafundinum, at hevði atkvøðugreiðslan verið sum upprunaliga ætlað, hevði uppskotið neyvan fingið meiriluta. Nú er avgjørt, at Parlamentið skal atkvøða um tað í januar.

Vinstravongurin í flokki hansara, Labour, hevur lovað honum harðan dyst til ta tíð.

# Aftur ein snigskjútti í USA

**Løgrreglan í amerikanska statinum Ohio hevur illgruna um, at ein sniðskjútti er farin at gera um seg. Fyribils hevur hann skotið eftir fleiri bilum**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri einari viku síðani doyði tann 62 ára gamla Gail Knisley, tá onkur lat fleiri skot av eftir bili hennara á ringvegnum, sum er rundan um býin Columbus í statinum Ohio.

Í bili hennara fann løgreglan fleiri kúlur, og kanningar vístu, at kúlurnar vóru sama slag sum kúlur, ið løgreglan hevur funnið aftan á ellivu aðrar skottilburðir í statinum. Eisini tær vórðu funnar í bilum, sum ein ella annar hevði skotið eftir uttan at raka bilførararan.

Hóast umfatandi kanningar stendur løgreglan í Ohio púra á berum, og 595 fráboðanir frá fólki hava ikki givið nakað úrslit.

Av góðum grundum ber løgreglan ótta fyri, at tað sama skal henda har, sum hendi á Washington-leiðini seinasta heyst, tá tveir menn skutu tíggju tilvildarlig fólk. Annar av monnunum fekk her fyri deyðadóm.

Hetta er ikki tað einasta málið av hesum slagnum. Fyri fýra mánaðum síðani vórðu trý fólk skotin í West Virginia. Tann ella tey, sum skutu, eru ikki funnin enn, men løgreglan veit við vissu, at øll skotini komu frá somu byrsu.




Hyundai Sonata 2.0 bensin



· Myrkagráur
· Árgang 2002
· Km. 32.000
· El-rútar
· Klimaanlegg v.m.
· Hita í setrunum
· Sera vælhildin

prísur 177.500,-

Sosialurin 341800

Ford Mondeo 1.8 TD Stationcar



· Árgang des 1998
· Km. 130.000
· Krók · Tokulyktir
· El-rútar
· Klimaanlegg
· CD spælara við 6 fløgum
· Hiti í forrútinum
· Hiti í forsetrum · 4 nýggj heilársdekk á felgum og summardekk á sportfelgum fylgja við · Vælhildin

prísur 135.000,-

Rexton RX290 4x4 nýggjur



· Mercedes motorur
· 2.9 litur
· Aircondition
· El-rútar v.m.

Vørubilur, prísir úr 238.648,- v/mvg
Persónbilur, prísir úr 311.190,- v/mvg

Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler



· Gráur metalllakk
· Árgang 1999
· Km. 95.000
· 5 setur · Aircondition
· Altimetur · El-spegl
· El-rútar framman
· Hita í setrum
· Tokulyktir
· Lættmetalfelgur við heilársdekkum
· Summardekk fylgja við
· Vælhildin

prísur 158.000,-

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com








## Til sølu



**Toyota Carina E 2.0 Gli 133 hk**

Árg. juli 1996. Koyrt 125.000.

17" sportfelgur 215/40 dekk, Kenwood fløguspælara. Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 220071 ella 757087**



## Sjúkrakassalimir í Nes Sóknar Sjúkrakassa

Sagt verður frá, at gjaldsháttturin er broyttur frá mánaðarliga til kvartalsliga.
T.v.s. at limagjald kr. 600,- verður at rinda ávikavist í januar, apríl, juli og oktober mánaði.

Mint verður á, at eftirstøðan fyri árið 2003 eigur at verða goldin nú.

Teir limir, ið ikki hava valt lækna, og tey, ið ynskja at skifta lækna frá 1. januar 2004, skulu siga frá nú ella í seinasta lagi 19. desember 2003.

**Nes Sóknar Sjúkrakassi**
620 Runavík – Tlf. 448129



## Dagrøktari søkist

Søkt verður eftir dagrøktara til dagrøktarskipanina í Skála kommunu, at byrja 2. januar.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Umsóknir skulu vera dagrøktarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 15. desember 2003.

Áhugað kunnu venda sær til Dagrøktarleiðaran á **tlf. 227393 ella 442059.**

**Skála Kommuna**